Kunngerðablaðið A
2009 Hefti 21
ISSN 0907-905X

Nr. 102 6. august 2009

**Kunngerð
um
læknakanning av kavarum**

Við heimild í § 3, stk. 2, § 4, stk. 3, og § 24, stk. 8 í løgtingslóg nr. 46 frá 15. mai 2007, verður ásett:

**§ 1.** Kunngerðin fevnir um persónar, sum útinna vinnuligt kavaraarbeiði.

*Læknakanning av kavarum, sum útinna vinnuligt kavaraarbeiði*

**§ 2.** Kavarar, sum útinna kavaraarbeiði, skulu hava heilsuváttan um læknakanning, sum er galdandi fyri viðkomandi kavaraarbeiði.

**§ 3.** Kavarar skulu annað hvørt ár, við læknakanning fáa staðfest, at teir eru skikkaðir at útinna kavaraarbeiði.

**§ 4.** Ein umsøkjari, ið verður tikin inn á ein góðkendan kavaraskúla, ella luttekur á kavaraskeiði, sum veitir góðkenda kavaraútbúgving, skal hava heilsuváttan frá læknakanning fyri kavarar, sum ikki er eldri enn 3 mánaðir, tá søkt verður.

**§ 5.** Er ivi um, at kavari, sum hevur kavarabræv, vegna heilsustøðuna framhaldandi er skikkaður til at útinna kavaraarbeiði, kann Arbeiðseftirlitið krevja, at viðkomandi skal lata seg kanna av nýggjum hjá lækna, um hann lýkur heilsustøðuna.

**§ 6.** Tá læknin kannar kavara ella umsøkjara sbr. § 3 og 4, skal metast um likamliga og sálarliga heilsustøðan er soleiðis, at tann kannaði er egnaður at útinna vinnuligt kavaraarbeiði sbrt. kanning læknans. Leiðreglar nevndar í § 11 kunnu nýtast í sambandi við kanningina.
*Stk. 2.* Um tað í sambandi við læknakanningina vísir seg, at tann kannaði hevur eina ella fleiri av teimum sjúkum, sum eru nevndar í leiðreglunum sbr. § 11 ger viðkomandi lækni eina meting, um tann kannaði er skikkaður til viðkomandi kavaraarbeiði, ella um arbeiðsøkið skal avmarkast í mun til tað, tann kannaði er skikkaður til.
*Stk. 3.* Um tað í leiðreglunum greitt er tilskilað, at sjúkan ger tann kannaða ikki skikkaðan at útinna kavaraarbeiðið, kann læknin meta tann kannaða at vera ikki skikkaðan.

*Afturtøka av vinnuligum kavarabrævi*

**§ 7.** Lýkur kavari ikki tey ásettu heilsukrøvini, fer kavarabrævið úr gildi og kann takast aftur av Arbeiðseftirlitinum. Sama er galdandi, um kavari noktar at lata seg kanna av lækna sbrt. §§ 3 og 5.
*Stk. 2.* Tann, sum kavarabrævið verður tikið frá, kann krevja at avgerðin um at taka kavarabrævið, verður lagt fyri rættin til avgerðar. Áheitan um hetta skal latast Arbeiðseftirlitinum innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið kunning um avgerðina.
*Stk. 3.* Tá kravt verður, at avgerðin um at taka kavarabrævið skal leggjast fyri rættin, leggur Arbeiðseftirlitið sak móti viðkomandi kavara eftir skipanini í rættargangslógini um borgarlig sakarmál.
*Stk. 4.* Áheitan um at ein avgerð eftir stk. 1 skal leggjast fyri rættin, er steðgandi. Arbeiðseftirlitið kann tó gera av, at ein áheitan ikki er steðgandi.
*Stk. 5.* Rætturin kann við úrskurði seta úr gildi eina avgerð eftir stk. 4, áðrenn avgerð um afturtøkuni av loyvinum verður tikin.

**§ 8.** Eitt vinnukavarabræv, sum er afturtikið, skal latast Arbeiðseftirlitinum.
*Stk. 2.* Arbeiðseftirlitið kann altíð geva eitt vinnukavarabræv aftur, sum er tikið sbrt. § 7, um so er, at tær umstøður, sum vóru orsøk til at taka vinnukavarabrævið, ikki longur eru til staðar.
*Stk. 3.* Verður umsókn um at fáa vinnukavarabrævið aftur ikki gingin á møti, kann umsøkjarin krevja avgerðina lagda fyri rættin eftir mannagongdini í § 7, stk. 3.
*Stk. 4.* Hevur málið fyrr verið latið rættinum, kann avgerðin bert leggjast fyri rættin, um minst eitt ár er fráliðið, síðan afturtøkan seinast er staðfest við dómi.

*Kavaralæknar*

**§ 9.** Deildin fyri arbeiðsmedisin kann krevja, at teir læknar, sum fyriskipa læknakanning av kavarum, skulu hava eitt serligt skeið í læknafrøði innan kavaravinnu.
*Stk. 2.* Allir kommunulæknar, sum ikki hava fingið serligt krav sbrt. stk. 1, hava rætt at fyriskipa læknakanning av kavarum.
*Stk. 3.* Deildin fyri arbeiðsmedisin kann tilnevna

aðrar læknar at fyriskipa læknakanningar av kavarum, um so er, at hesir hava neyvan kunnleika um kavaramedisin.

*Almennar reglur*

**§ 10.** Læknakanning av kavarum skal fara fram í Føroyum.

*Stk. 2.* Deildin fyri arbeiðsmedisin kann gera frávik frá ásetingini í stk. 1.

*Leiðreglur*

**§ 11.** Deildin fyri arbeiðsmedisin góðkennir oyðublað at nýta til læknaváttan fyri vinnukavarar, og ásetur leiðreglurnar fyri læknakanningini

**§ 12**. Arbeiðseftirlitið ger av um skap og innihald viðvíkjandi kavaravinnubrævinum.

*Kæra*

**§ 13.** Innan 4 vikur frá tí, at kanning av kavara ella umsøkjara er farin fram, kann úrslitið av læknakanningini kærast til Vinnukærunevndina.

*Gildi og fyribilsreglur*

**§ 14.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi "bekendtgørelse nr. 501 af 25 november 1985 om lægeundersøgelse af erhvervsdykkeraspiranter og erhvervsdykkere, sum sett í gildi við kunngerð nr. 138 frá 3. desember 1990 um kavaraútgerð, um tryggleika og um læknakanning hjá kavarum § 2, stk. 1.

*Stk. 3.* Læknakanningar, sum eru fingnar eftir kunngerð nevnd í stk. 2, verða verandi í gildi, tó í mesta lagi í 12 mánaðir at rokna frá gildiskomu av hesi kunngerð.

Vinnumálaráðið, 6. august 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

Nr. 103 6. august 2009

# Kunngerð
# um
# kavaraskúlar, kavaraskeið og góðkenda kavaraútbúgving

Við heimild í § 4, stk. 3, § 5, stk. 1 og stk. 5, § 12, § 17, stk. 1, § 21 og § 22 í løgtingslóg nr. 46 frá 15. mai 2007 um Kavaravinnu og kavaraútgerð, verður ásett:

**§ 1**. Kunngerðin fevnir um frálæru og próvroynd fyri vinnukavarar, frá kavaraskúlum ella frá kavaraskeiðum, sum sbrt. § 2, stk. 1 veita kavaraútbúgving frá kavarafrálærustovni við góðkenning sbrt. § 2, stk. 2, sbr. § 3, stk. 1.

**§ 2.** Frálæra til vinnukavarar við luftveitan frá landi við vanligari luft sum andingarevni, SCUBA-kavarar við vanligari luft sum andingarevni, blandingskavari og kavarahjálparfólk, kann verða fingin frá kavaraskúla ella við kavaraskeiði frá kavarafrálærustovni, sum kann veita frálæru eftir ásetingum í hesi kunngerð.
*Stk. 2*. Frálæran frá kavaraskúla ella kavarafrálærustovni er treytað av góðkenning frá tí í § 3, stk. 1 nevndu prótvøkunevnd.
*Stk. 3.* Próvtøkunevndin skal í samband við góðkenningina taka serligt atlit til, at tað á skúlanum ella kavarafrálærustovninum verður veitt frálæra á tryggasta verkliga og ástøðiliga støði.
*Stk. 4.* Próvtøkunevndin kann taka góðkenningina aftur, um treytirnar fyri góðkenningini, ella onnur viðurskifti í hesum sambandi, ikki eru uppfylt.

**§ 3.** Vinnumálaráðið setir eina próvtøkunevnd við 3 limum, sum góðkennir tað í § 2, stk. 1 nevndu frálæru og frálæru sbr. fylgiskjali 1.
*Stk. 2.* Nevndin sbr. stk. 1 stendur fyri próvtøku í sambandi við tær í §§ 8 – 12 nevndu royndir.
*Stk. 3.* Ein limur í nevndini sbr. stk. 1 verður tilnevndur eftir tilmæli frá Deildini fyri Arbeiðs- og Almenna heilsu, ein limur eftir tilmæli frá Skipaeftirlitinum og ein limur eftir tilmæli frá Arbeiðseftirlitinum. Vinnumálaráðið tilnevnir formannin.

*Upptøkutreytir fyri at kunna luttaka á føroyskum kavaraskúla*

**§ 4.** Tað er ein treyt fyri at kunna verða tikin inn á ein skúla, ella luttaka á kavaraskeiði fyri vinnukavarar í Føroyum, sum veitir frálæru til útbúgving í vinnukaving sbr. § 2, stk. 1 at umsøkjarin:

1) Er 18 ár.
2) Innan tey seinastu 2 árini hevur staðið góðkent skeið í fyrstuhjálp.
3) Hevur verið til læknakanning sbr. § 4 í kunngerð um læknakanning av kavarum, sum staðfestir at kavarin er skikkaður at útinna kavaraarbeiði.

**§ 5.** Treytin fyri at kunna verða tikin inn á ein kavaraskúla ella karavaskeið, ið veitir frálæru í skering/sveising, trýstspuling og spreinging er, at kavarin hevur vinnubræv sum kavari við luftveitan frá landi.

**§ 6.** Treytin fyri at kunna verða tikin inn á ein kavaraskúla ella kavaraskeið, ið veitir frálæru til kavarahjálparfólk, er, at umsøkjarin;

1) Er fyltur 18 ár.
2) Innanfyri seinastu 2 árini hevur staðið skeið í fyrstuhjálp.

**§ 7**. Treytin fyri at kunna verða tikin inn á ein kavaraskúla ella kavaraskeið, ið veitir frálæru í sambandi við bjargingaruppgávur, er, at kavarin hevur vinnubræv sum SCUBA-kavari, ella kavari við luftveitan frá landi.

## Innihald í frálæruni á føroyskum kavaraskúla

*Kavarar við luftveitan frá landi*

**§ 8.** Fyri at fáa vinnubræv sum kavari við luftveitan frá landi við vanligari luft, verður frálæra givin og próvroynd tikin í hesum lærugreinum:
Verklig kaving á 0 - 50 metra dýpi í minsta lagi 2000 minuttir. Royndirnar skulu gerast bæði við SCUBA-kavaraútgerð og við kavaraútgerð, sum krevur luftveitan frá landi.

1) Mannagongdir á landi, harímillum kavaraútgerð.
2) Samskifti, signalering og at sita við línu.
3) Vandar í sambandi við kavaraarbeiði.
4) Mannagongdir í neyðstøðu í sambandi við kavaraarbeiði.
5) Arbeiði undir vatnlinjuni.
6) Frálæru í at passa viðgerðar– og trýstkamarútbúnað.
7) Kavingar-, trýstlætta- og viðgerðartalvur.
8) Kavaralóggávan.
9) Dugnaskap við atliti til kavaravinnu og virksemi sum knýtir seg at hesum.
10) Læknaváttan sum prógvar kavaraheilsu og lívvirkisfrøði.
11) Logbók.

*Blandingsgasskavari*

**§ 9.** Fyri at fáa vinnubræv sum kavari við blandingsgassi sum andingarkelda, verður frálæra givin og próvroynd tikin sbrt. ásetingunum í § 3.

*SCUBA-kavari*

**§ 10.** Fyri at fáa vinnubræv sum SCUBA-kavari við vanligari luft sum andingarevni at útinna arbeiði til 0-30 metra dýpi, verður frálæra givin og próvroynd tikin í hesum lærugreinum:

1) Verklig kaving á 0 - 25 metra dýpi í minsta lagi

900 minuttir. Royndirnar at læra at kava niður á 30 metra dýpi skulu fremjast við SCUBA-kavaraútgerð.
2) Mannagongdir á landi, undir hesum handfaring av kavaraútgerð.
3) Samskifti, signalering og tað at sita við línu.
4) Vandar, ið eru í sambandi við kavaraarbeiði
5) Mannagongdir í neyðstøðu í sambandi við kavaraarbeiði.
6) Arbeiði undir vatnlinjuni.
7) Kavingar-, trýstlætta- og viðgerðartalvur.
8) Kavaralóggávan.
9) Dugnaskap við atliti til kavaravinnu og virksemi sum knýtir seg til kavaravinnu.
10) Læknaváttan sum prógvar kavaraheilsu og lívvirkisfrøði.
11) Logbók

*Skeið í skering/sveising v.m.*

**§ 11.** Próvtøkunevndin sbr. § 3, stk. 1 ásetir innihaldi og longdina á skeiðum sum umfatar skering/sveising, hátrýstspuling (30 bar og meira), spreinging og kaving í samband við bjargingartiltøk sbr. fylgiskjal 1.

*Hjálparfólk*

**§ 12.** Til skeiðsprógv sum hjálparfólk hjá kavara, verður undirvíst í eftirfylgjandi lærugreinum:
1) Fyrstuhjálp.
2) Kavaraástøði.
3) Kavaralóggávan.
4) Vanligar uppgávur hjá einum kavara.
5) Hjálpartól og maskinur.
6) Signalir og sjómansskapur.
7) Kompressaraútgerð og kavaraútgerð.
8) Logbók.

*Skiftisreglar*

**§ 13**. Teir kavarar, sum hava vinnubræv frá Arbeiðseftirlitinum ella frá Føroya Landsstýri, at útinna kavaravinnu, ella hava søkt Arbeiðseftirlitið um vinnubræv, men sum ikki lúka krøvini í §§ 8 – 12, kunnu, tá henda kunngerð kemur í gildi, í eitt 2 ára tíðarskeið útinna kavaravinnu eftir niðanfyri standandi reglum.

**§ 14**. Vinnukavari nevndur í § 13 kann, treytað av góðkenning frá próvtøkunevndini sbrt. § 24, stk. 3 í løgtingslóg nr. 46 frá 15. mai 2007 um kavaravinnu og kavaraútgerð, útinna kavaraarbeiði sum SCUBA-kavari niður á 12 metra dýpi ella annað dýpið, sum próvtøkunevndin ger av, í sambandi við arbeiði, sum umfatar at skera, saga, loysa, festa, sláa, reinsa o.l., um so er, at hann kann skjalprógva:
1) At hava í minsta lagi 25 vinnukav innanfyri teir seinastu 12 mánaðinar.
2) At hava útinnt vinnuligt kavaraarbeiði, sum svarar til tað kavaraarbeiðið, sum søkt verður um vinnubræv til.
3) At hava kavararoyndir við SCUBA-kavaraútgerð.
4) At hava kunnleika og royndir við mannagongdum á landi, undir hesum handfaring av kavaraútgerð.
5) At hava kunnleika og royndir viðvíkjandi samskifti, signalering og tað at sita við línu.
6) At hava kunnleika um vandar, ið eru í sambandi við kavaraarbeiði.
7) At hava royndir við arbeiði undir vatnlinjuni.
8) At hava kunnleika og royndir um mannagongdir í neyðstøðu í sambandi við kavaraarbeiði.
9) Nýtslu av kavingar- og trýstlætta talvum.
10) Hava kunnleika um kavaralóggávuna.
11) At sýna dugnaskap við atliti til kavaravirksemið.
12) Læknaváttan fyri kavarar.
13) Logbók fyri øll vinnukav, sum í minsta lagi skulu vera sum nevnt í nr. 1.

**§ 15.** Teir í § 13 nevndu vinnukavarar fáa eitt serstakt vinnukavarabræv sbr. § 23, stk. 2, sum hevur gildi í 2 ár frá dagfestingini av vinnubrævinum.
*Stk. 2.* Fyri at kunna útinna kavaravinnu eftir at tíðarskeiðið, nevnt í stk. 1 er liðið, skal vinnukavari hava fingið útbúgving og staðið viðkomandi próvroynd eftir reglunum í §§ 8 – 12.
*Stk. 3.* Um so er, at próvtøkunevndin sbrt. § 3, metir at teir í stk. 1 nevndu kavarar hava ávísan førleika, kann atlit verða tikið til hetta í sambandi við stk. 2, og fáa góðskrivað henda førleika í sambandi við skeiðið nevnt í stk. 2.

*Próvtøka og góðkenning*

**§ 16.** Próvtøkan umfatar verkliga kavararoynd, kavaraástøðisroynd (skrivlig roynd) og kavaraútgerð og trygd (munnliga roynd).
*Stk. 2.* Fyri at sleppa til kavaraástøðisroynd og roynd í kavaraútgerð og trygd, skal umsøkjarin í minsta lagi hava fingið próvtalið 2 fyri kaving í verki, givið av tí lærara, sum hevur fyrireikað viðkomandi, eins og at umsøkjarin skal hava fylgt tí skipaðu undirvísingini.

**§ 17.** Próvtøkunevndin sbrt. § 3, stk. 1 ger uppgávurnar til tær skrivligu royndirnar og setir upp evnini til tær munnligu royndirnar. Somuleiðis ger nevndin av, hvørjar lærubøkur og hjálparamboð kunnu nýtast, í sambandi við royndirnar.

**§ 18.** Próvdøming av ávikavist roynd í kavaraástøði, kavaraútgerð og trygd, verður gjørd av tí lærara, sum hevur givið frálæru í viðkomandi lærugreinini, og einum próvdómara, ið er ein av limunum í próvtøku- og góðkenningarnevndini. Lærari og próvdómari geva hvør sítt próvtal.
*Stk. 2.* Próvtøkunevndin kann tilnevna persón, sum hevur ástøðiligan og verkligan førleika til tess at geva frálæru og ella vera próvdómari.

**§ 19.** Til próvdømingina verður 7 tals stigin brúktur sambært teimum galdandi reglum fyri almennar útbúgvingarstovnar.

**§ 20.** Eru lærari og próvdómari ósamdir um próvtalið, verður próvtalið tað tal á stiganum, sum liggur næst miðaltalinum.

**§ 21**. Í sambandi við vinnukavararoyndina verður próvtal givið fyri hvørja av teimum í § 16 nevndu royndum.

*Stk. 2.* Fyri at standa próvtøku krevst, at einki próvtal er undir 2.

*Prógv sum vinnukavari og vinnubræv*

**§ 22.** Próvtøkunevndin skrivar út prógv til teir persónar, ið hava staðið útbúgvingarnar sbr. §§ 8 – 12.

*Stk. 2.* Próvtøkunevndin kann heimila skúlum at skriva út tey sbrt. §§ 11 og 12 nevndu prógv.

**§ 23.** Arbeiðseftirlitið skrivar út vinnubræv til kavara samsvarandi tí útbúgving og prógvi, sum umsøkjarin hevur.

*Stk. 2.* Arbeiðseftirlitið skrivar út tey í § 15, stk. 1 nevndu vinnukavarabrøv.

*Stk. 3.* Omanfyri nevndu vinnubrøv skulu endurnýggjast annað hvørt ár sbrt. § 3 í kunngerð um læknakanning av kavarum.

*Stk. 4.* Arbeiðseftirlitið tekur gjald fyri tey í stk. 1 og 2 nevndu vinnukavarabrøv.

*Gildiskoma*

**§ 24.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer kunngerð nr. 57 frá 9. mai 1994 um góðkendar kavaraskúlar og kunngerð nr. 26 frá 1. mars 1994 um kavaraskeið og kavararoyndir úr gildi.

Vinnumálaráðið 6. august 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arni Poulsen (sign.)

**Kunngerð**
**um**
**útinnan av kavaraarbeiði á tryggan hátt**

Við heimild í § 3, stk. 2, § 11, stk. 1 og § 12, § 13, stk. 2, § 17, § 18, stk. 1 og stk. 3, § 19, § 21 í løgtingslóg nr. 46 frá 15. mai 2007 um Kavaravinnu og Kavaraútgerð.

*Øki*

**§ 1.** Henda kunngerð fevnir um persónar, sum røkja vinnuligt kavaraarbeiði, tá ið arbeiðið fer fram á landleiðini ella á føroyskum sjóøki og frá føroyskum skipum og niður á 0-50 metra dýpi.

*Stk. 2.* Kunngerðin fevnir ikki um:

1) persónar, sum útinna kavaraarbeiði á útlendskum skipum, tá teir hoyra til manningina, og
2) persónar hjá donsku sjóverjuni, tá kavaraarbeiði verður útint í tænastuni.

*Stk. 3.* Kunngerðin fevnir um frálandavinnu á øki sbr. stk. 1, um so er, at annað ikki er fyrisett í løgtingslóg um kolvetni, ella aðrari lóggávu.

*Stk. 4.* Kavaraarbeiði, sum verður útint frá skipum undir føroyskum flaggi í útlandinum, kann gerast av útlendskum kavarum, sum ikki hava vinnubræv sum kavari, tá ið viðkomandi kavari ikki hoyrir til manningina.

*Stk. 5.* Annars hava ásetingarnar í hesi kunngerð ikki avmarkingar í nýtslu av ásetingum í aðrari lóggávu, í tann mun tær ásetingarnar eru skerpandi.

*Allýsingar*

**§ 2.** Í hesi kunngerð merkir:

1) *Arbeiðsdagbók:* Yvirlit, har allir viðkomandi upplýsingar í samband við ávísa kaving, eru skrivaðir niður av arbeiðsgevara.
2) *Trýstkamar:* Eitt hóskandi útgjørt trýstkamar, sum er ætlað til eina trýstlætting á landi, sum er løgd til rættis til viðgerð av kavarasjúku.
3) *Kavaraarbeiði:* Arbeiði, sum verður útint undir vatni, sum krevur nýtslu av andingarútgerð og sum vanliga verður gjørt móti gjaldi. Serligar uppgávur hjá kavara so sum bjarging ella líknandi, harímillum uppgávur, sum bjargingarfeløg standa fyri, verða eisini roknaðar sum kavaraarbeiði, uttan mun til, um goldið verður fyri arbeiði ella ikki. Kavaraarbeiði fevnir um alt fyrireikandi arbeiði á kavarastaðnum, áðrenn kavarin fer í vatni, til kavarin er komin út vatninum, úr trýstkamari ella øðrum staði og ikki longur er umgyrdur av størri trýsti enn vanligum lufttrýsti.
4) *Kavaravinnulækni:* Lækni, sum Deildin fyri arbeiðs- og almenna heilsu kann góðkenna til at gera heilsukanningar av kavarum. Kommunulækni kann eisini gera hesa læknakanning.
5) *Kavaraútgerð:* Alt tilfar og øll útgerð og hjálparútgerð, sum verður brúkt í sambandi við, at kava verður.
6) *Kavaraútbúnaður:* Tann kavaraútgerð, sum ger tað møguligt at kunna vera í minsta lagi 0,4 metur ella meira undir vatni og kunna anda.
7) *Kavarastað:* Pallur, bryggja, skip o.l. har kavaraarbeiði fer fram, ella verður skipað frá.
8) *Kavaraútbúgving:* Kavaraútbúgving frá kavaraskúla ella kavaraskeiði.
9) *Kurv:* Fluttningspallur, sum ikki hevur luftlummar.
10) *Opin klokka:* Kavaraklokka við luftlumma, sum ikki kann hava størri trýst í luftlumma, enn í vatni uttanum.
11) *Logbók:* Yvirlit har upplýsingar um hvørja ferð kava verður, verða skrivaðir niður.
12) *Luftveitan frá landi:* Kavari sum, ílatin kavaraútbúnað, fær andingarevni frá lufttóli á landi ella oman vatnlinjuna, gjøgnum eina ella fleiri slangur (umbilical).
13) *Yvirtrýst:* Meira enn eitt bar absolut.
14) *Trýstseting:* Yvirtrýst.

*Undantøk*

**§ 3.** Arbeiðseftirlitið kann gera undantøk frá ásetingunum í §§ *4-26*, um so er, at serligir arbeiðshættir verða nýttir, harímillum brúk av øðrum fyrisettum mátum, nýtslu av serligari kavaraútgerð og kavaraskipanum, somuleiðis tá onnur serlig viðurskifti, sum Arbeiðseftirlitið metir, at kavaraarbeiði kann útinnast eftir á trygdar- og heilsuliga líka tryggan hátt.

*Útinnan av arbeiði*

**§ 4.** Kavaraarbeiði skal á allan hátt vera lagt til rættis og útint trygdar- og heilsuliga fult forsvarligt.

**§ 5.** Kavaraarbeiði skal, við atliti til slag av arbeiði, og hvussu umfatandi tað er, somuleiðis har kavaraarbeiði fer fram, vera lagt soleiðis til rættis, at arbeiði hjá kavara og øðrum hjálparfólki trygdar- og heilsuliga fer fram á fult tryggan hátt.

*Stk. 2.* Kavari skal tryggja sær, at útgerðin, sum nýtt verður, er í lagi, áðrenn hon verður tikin í brúk.

*Stk. 3.* Kavari, ella tann sum hevur ábyrgd av kavaraarbeiðinum, skal vegleiða hjálparfólkið um skyldur teirra í sambandi við kavaraarbeiði.

*Stk. 4.* Kavari skal hava neyðuga tíð til hvíld og svøvn og skal skipast soleiðis, at í hvørjum samdøgri, roknað frá tí at arbeiði byrjar, skal kavari hava eina hvíldartíð, ið er minst 11 samfeldar tímar, bæði tá kava verður frá landi og frá skipi.

*Stk. 5.* Tað má ikki áleggjast einum kavara at kava, um hesin er illa fyri, er ótryggur ella ikki metir seg kunna útinna arbeiði á fult tryggan hátt.

*Stk. 6.* Um so er, at persónur, sum hevur vinnubræv sum kavari, hevur verið óarbeiðsførur orsakað av niðanfyri nevndu viðurskiftum, skal hesin ikki byrja

aftur at kava, fyrr enn arbeiðsgevarin hevur sæð heilsuváttan frá lækna um, at viðkomandi er arbeiðsførur at útinna kavaraarbeiði:

1) Óarbeiðsføri vegna sjúku ella skaða í meira enn 20 dagar.
2) Verið innlagdur á sjúkrahús ella skaðastovu.
3) Vera við barn.
4) Ein og hvør sjúka ella umstøður sum gera nýtslu av optiskum ella mekaniskum tólum neyðugt.
5) Ein og hvør sjúka ella umstøður sum førir við sær regluligan ella afturvendandi tørv fyri viðgerð við heilivági.
6) Um tað í tíðarskeiðinum, sum heilsuváttanin hevur gildi, kemur ivi í, um kavarin uppfyllir heilsukrøvini.

*Stk. 7.* Fyri hvønn trýstseting (tryksætning) sum kavarin ger, skal hann føra eina logbók, sum er góðkend av Arbeiðseftirlitinum. Innskriving í logbók fyri hvørja ferð kava verður og hvørja ferð trýstseting verður gjørd, skal undirskrivast av kavaranum sjálvum og kavaraleiðaranum. Er eingin kavaraleiðari á staðnum, verður logbókin undirskrivað av arbeiðsgevaranum, ella av skiparanum, um so er, at kavarin er settur í starv hjá einum reiðaravirki.

*Stk. 8.* Hvørja ferð kavaraarbeiði verður útint, skal ein arbeiðsdagbók, ið er góðkend av Arbeiðseftirlitinum, vera førd. Kavari og arbeiðsgevari skulu goyma arbeiðsdagbók og logbók í minsta lagi 5 ár frá tí, at seinast er skrivað í hesar. Um so er, at mál er lagt fyri rættin um útinnan av kavaraarbeiði, sum stavar frá tíðarskeiðinum, sum arbeiðsdagbók og logbók umfatar, skulu hesar bøkur goymast til málið er endaliga avgreitt.

*Stk. 9.* Kavari skal í minsta lagi annaðhvørt ár taka endurútbúgvingarskeið í fyrstuhjálp, sum er góðkent av Arbeiðseftirlitinum.

**§ 6.** Útinna tríggir ella fleiri kavarar eina kavarauppgávu saman, skal ein kavaraleiðari tilnevnast.

*Stk. 2.* Kavaraleiðarin skal hava staðið tær kravdu royndir og skeið, sum sambært kunngerð um kavaraskúlar, kavaraskeið og góðkenda kavaraútbúgving, geva rætt til at útinna kavaraarbeiði við tí útgerð, sum verður nýtt til viðkomandi uppgávu. Eisini skal kavaraleiðarin kunna vísa, at tað er sannlíkt, at hann hevur í minsta lagi 2 ára verkligar royndir í sambandi við vinnukavaraarbeiði, umframt at hann hevur royndir við viðkomandi arbeiðsuppgávum.

*Stk. 3.* Kavaraleiðarin má ikki, meðan hann er leiðari av kavaraarbeiðinum, taka lut í sjálvari kavingini, ella røkja uppgávur, sum eru óviðkomandi í samband við kavaraarbeiði. Heldur ikki má kavaraleiðarin hava verið fyri yvirtrýsti seinastu 12 tímarnar.

*Stk. 4.* Kavaraleiðarin skal leggja til rættis, fremja, deila og leiða tað arbeiði, sum hevur tilknýti til viðkomandi uppgávur, harímillum at arbeiði kann útinnast trygdar- og heilsuliga fult forsvarligt. Kavaraleiðarin skal síggja til, at øll kavara- og hjálpiútgerð, sum verður nýtt, er trygdar- og heilsuliga fult forsvarlig og í samsvari við galdandi reglur.

*Stk. 5.* Verður eingin kavaraleiðari tilnevndur sbr. stk. 1 av tí, at tað bert eru ein ella tveir kavarar, sum útinna kavarauppgávuna, áliggur tað hesum kavarum at tryggja sær, at neyðug hjálpiútgerð, útgerð og amboð v.m. eru í fullgóðum standi og í samsvari við galdandi reglur.

**§ 7.** Um tað gerst neyðugt, tilnevnir arbeiðsgevarin í samráð við kavara ella møguligan kavaraleiðara hjálparfólk til kavaraarbeiðið. Um kava verður frá skipi, skal hjálparfólk tilnevnast í samráð við skipara, um so er, at kavarin er í starvi í felagnum.

*Stk. 2.* Hjálparfólkið nevnt í stk. 1, skal kunna prógva neyðugan kunnleika til viðkomandi arbeiði, annaðhvørt við vinnubrævi til kavaraarbeiði, ella við at hava góðkenda kavaraútbúgving sbrt. kunngerð um kavaraskúlar og kavaraskeið.

*Stk. 3.* Hjálparfólkið, nevnt í stk. 1, skal í minsta lagi annaðhvørt ár taka endurútbúgvingarskeið í fyrstuhjálp, sum er góðkent av Arbeiðseftirlitinum.

*Stk. 4.* Hjálparfólkið, nevnt í stk. 1, skal í sambandi við kavaraarbeiði, einans passa ein kavara og má ikki taka á seg aðrar uppgávur.

*Stk. 5.* Kavaraarbeiði skal altíð vera tillagað hvussu umfatandi, arbeiðið er. Er kavaraarbeiði umfatandi, skal eitt kavaralið av hóskandi stødd skipast. Tað skal tó í minsta lagi vera ein kavari og eitt kavarahjálparfólk á kavaraliðinum, umframt eitt fólk, sum kann veita hjálp til kavaran og kavarahjálparfólkið.

**§ 8.** Kavaraarbeiði, sum krevur trýstlættakamar á staðnum ella í eini fjarstøðu frá kavarastaðnum, sum er ráðilig, má ikki fara fram, um so er, at henda útgerð ikki er tøk á staðnum, ella so nær staðnum, at stundir eru til at flyta kavaran vandaleyst til trýstlættakamari.

*Stk. 2.* Er tann í stk. 1 nevnda útgerðin á staðnum ella í eini fjarstøðu frá kavarastaðnum, sum er ráðilig og verður útgerðin brúkt í sambandi við kavaraarbeiði, skal ein persónur vera til staðar, sum ikki sjálvur kavar, men sum hevur útbúgving sum kavari ella aðra viðkomandi útbúgving, ið er góðkend av Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu. Hesin persónur skal vera fullkønur við at passa ta í stk. 1 nevndu útgerð, somuleiðis at brúka kavara- trýstlættatalvur. Hesin persónur skal ikki hava verið fyri yvirtrýsti teir seinastu 12 tímarnar.

**§ 9.** Við hvørja arbeiðsuppgávu, skal ein meting av arbeiðsumstøðunum gerast við atliti til heilsu og trygd hjá tí, sum skal útinna kavaraarbeiði. Tá arbeiðsuppgávan kann ætlast at bera ávísan vanda við sær, skal skrivlig meting gerast av arbeiðsumstøðunum sbr. § 4.

*Stk. 2.* Tá kavaraarbeiði fer fram undir torførum umstøðum, ella umstøðum sum kunnu ætlast at hava ávísan vanda við sær, skal ein eykakavari og eitt kavarahjálparfólk vera til staðar, sum kunnu taka við og veita hjálp beinanvegin, um tað gerst neyðugt. Tað áliggur arbeiðsgevara ella møguligum kavaraleiðara

og kavara í hvørjum einstøkum føri, gjølla at meta um, nær tílíkar umstøður eru til staðar.

**§ 10.** Tað áliggur kavaraleiðara, um tílíkur er á staðnum ella kavara, at veita neyva vegleiðing til persónar, ið eru knýttir at kavarauppgávuni, um teirra skyldur og viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri trygdina hjá kavaranum.

**§ 11.** Arbeiðsgevarin hevur skyldu til, í sambandi við kavaraarbeiði, at fráboða møguligan arbeiðsskaða og ella tilburð av eitran til Arbeiðseftirlitið. Tá kavað verður frá skipi, áliggur skyldan at boða frá hjá skiparanum. Fráboðast skal, um møguligur arbeiðsskaði ella tilburður av eitran hevur havt við sær óarbeiðsføri í ein dag ella meira umframt skaðadagin.

*Stk. 2.* Arbeiðseftirlitið skal somuleiðis hava boð um:

1) møguligar viðgerðir í trýstkamari, sum knýta seg til at kava hevur verið,
2) tilburður hevur ført við sær persónskaða av týdningi,
3) eldur hevur verið í,
4) skaði er hendur á umhvørvið, útgerð ella útbúnað, ella
5) skaði er hendur á ogn hjá triðja persóni.

*Stk. 3.* Um óhapp hendir í sambandi við kavaraarbeiði, sum førir við sær persónskaða, skal andingarevni, sum eftir er í andingarkelduni ella tilhoyrandi skipan, við atliti til seinni kanningar, verða tryggjað og goymt.

*Stk. 4.* Útbúnaðurin, sum veitir andingarevnið, skal liggja órørdur á staðnum, eins og onnur útgerð, sum hevur verið brúkt í sambandi við kavaraarbeiði, ikki skal takast burtur, fyrr enn Arbeiðseftirlitið ella annar viðkomandi myndugleiki hevur gjørt sínar kanningar á staðnum.

**§ 12.** Kavaraarbeiði, eftir hesi kunngerð, kann bert útinnast av persónum, sum hava prógv sum vinnukavari, við andingarevni frá landi.

*Stk. 2.* Kavaraarbeiði, har blandingsgass verður nýtt og kavaraarbeiði sum fer fram á meira enn 0-50 metra dýpi, kann einans verða útint av vinnukavarum, sum hava staðið roynd í kaving við blandingsgassi sbrt. kunngerð um kavaraskúlar og kavaraskeið.

**§ 13.** Hóast ásetingarnar í § 12 kunnu kavarar, sum hava prógv sum SCUBA-kavari sbr. § 10 í kunngerð um kavaraskúlar, kavaraskeið og kavaraútbúgving, útinna kavaraarbeiði á 0-30 metra dýpi við útgerð, sum gevur vanliga luft sum andingarevni. Nevnda arbeiði er tó avmarkað til lættari kavaraarbeiði,

1) sum er skipað trygdar- og heilsuliga fult forsvarligt,
2) sum ikki krevur nýtslu av øðrum enn handamboð, og
3) har ætla trýstlætting í sambandi við kavingina ikki verður nýtt.

*Stk. 2.* Hóast ásetingarnar í nr. 1, 2 og 3, kann annað kavaraarbeiði á 0-30 metra dýpi verða gjørt í tann mun, at frálæran, sum er góðkend av próvtøkunevndini sbr. 3, stk. 1 í løgtingslóg um kavaravinnu og kavaraútgerð, er fingin fyri tílíkt arbeiði.

**§ 14.** Kavaraarbeiði, sum fevnir um at skera, sveisa, spula við hátrýstamboði (30 bar ella meira) ella at spreingja, skal einans útinnast av kavarum, sum við nøktandi úrsliti hava luttikið á skeiði fyri tílíkt kavaraarbeiði umframt at hava tað í § 12, nevnda prógv.

*Stk. 2.* Kaving í sambandi við bjarging, kann útinnast av persónum við vinnubrævi sum ávikavist SCUBA-kavari ella vinnukavari við luftveitan frá landi, tá hesir hava luttikið í skeiði í hesum arbeiði.

*Stk. 3.* Skeiðini nevnd í stk. 1 og 2 skulu vera góðkend av tí í § 13, stk. 2 nevndu próvtøkunevnd. Kavaraprógvið skal áteknast av próvtøkunevndini ella øðrum stovni, sum próvtøkunevndin heimilar til tað.

*Stk. 4.* Tann, sum brúkar kavarar at gera tey í stk. 1, 2 og 3 nevndu arbeiði, skal tryggja sær, at kavararnir hava kavaraprógv við tí átekning, sum er kravd eftir stk. 3.

*Almennar reglur*

**§ 15.** Uppi yvir staðnum, har kavararbeiði verður útint, má einki arbeiði fara fram, sum minkar um trygdina hjá kavarum.

*Stk. 2.* Áðrenn byrjað verður uppá arbeiði, har neistar koma frá ella arbeiði við evni at rotviðgera tilfar o.l., skal tað tryggjast, at tilfar sum er etsandi og/ella sum spreingivandi kann standast av, í føstum, flótandi ella gasslíki, ikki er í tí tilfari, sum arbeitt verður upp á.

*Stk. 3.* Áðrenn byrjað verður uppá arbeiði, har tað er neyðugt at brúka hjálpitól, seramboð ella spreingievnir, skal kavarin kunna seg gjølla um leiðbeiningarnar fyri tílíkum arbeiði, sum eru givnar av framleiðaranum.

*Stk. 4.* Tá arbeitt verður við at skera, sveisa ella hátrýstspula ella arbeitt verður við amboðum, sum brúka orkuveiting frá landi, skal umframt kavarahjálparfólkið eisini neyðug manning til at passa orkuveitingina, vera skipað. Fólk skal støðugt vera hjá og passa orkuveitingina, meðan kavaraarbeiði fer fram. Um so er, at kavarahjálparfólkið ikki hevur beinleiðis samband við tann, sum passar orkuveitingina, skal annar beinleiðis samskiftismøguleiki vera skipaður millum hesi.

*Vandamikil evnir*

**§ 16.** Har vandamikil evni í skaðiligari nøgd kunnu vera við munnar við frárenslurør ella á øðrum støðum, har kavaraarbeiði verður útint, skulu niðanfyri tilskilaði tiltøk verða sett í verk:

1) Áðrenn kava verður, skal kannast hvussu umfatandi dálkingin er og slag av dálking, undir hesum um møguligar vandar fyri spreinging. Kavarar og hjálparfólk skulu kunnast um dálkingina.

Skipast skal soleiðis fyri, at sjúk ella skadd fólk kunnu koma undir læknaviðgerð uttan óneyðuga seinkan.

2) Kavarin skal vera vardur móti, at húðin kann koma í samband við tað dálkaða umhvørvið á staðnum. Tí skal kavarin brúka turrdrakt antin við hjálmi ella heilmasku og hanskar, sum fella tætt at draktini.
3) Á kavarastaðnum skal vera reint vatn til at spula kavaran og útgerðina, áðrenn kavarin letur seg úr draktini og leggur frá sær útgerðina.
4) Skolivatn at nýta til eygu, skal vera tøkt til brúk á staðnum.

*Tilfar, útgerð og amboð v.m.*

**§ 17.** Kavarastaðið skal vera merkt við signalteknum v.m. samsvarandi galdandi altjóða sjóreglum.
*Stk. 2.* Millum skip og onnur før, sum luttaka í kavaraarbeiðinum, skulu vera tryggir samskiftismøguleikar. Krevja umstøðurnar tað, skal eitt skip ella annað far við samskiftisútgerð umborð virka sum leiðbeinaraskip fyri øðrum skipum, tá siglt verður framvið.

**§ 18.** Nøktandi útbúnaður sum ger, at kavari á lættan og fult tryggan hátt kann fara í vatni og koma úr aftur vatninum, skal vera tøkur á staðnum, har kavaraarbeiði fer fram.
*Stk. 2.* Um útbúnaður at seta kavara í vatni stendur meira enn 5 metur yvir vatnlinjuni, skal kavarin nýta kurv ella opna klokku, tá farið verður í vatni.

**§ 19.** Tá kavari arbeiðir á træverki o.l., stendur á kavaraleytara ella undir flutningi á kavarapalli ella líknandi, skal kavarin vera tryggjaður móti falli.
*Stk. 2.* Tá kavað verður við SCUBA-útgerð, kann kavarin lata vera at brúka bjargingardrakt, sum hóskar til kaving, um tað sbr. § 9, stk. 1 verður mett, at vandin er størri av at brúka eina bjargingardrakt, enn at lata vera. Henda meting skal skrivast í arbeiðsdagbókina ella hjáleggjast hesi.

**§ 20.** Tá kava verður, skal kavarin vera í samband við kavarahjálparfólkið og/ella kavaraleiðaran um eina telefonlinju og lívlínu.
*Stk. 2.* Tá kava verður og nýtslan av lívlínu økir vandan fyri trygdini, kann kavarin lata vera at brúka lívlínu, um tað sbr. § 9, stk. 1 verður mett, at vandin er størri av at brúka lívlínu enn at lata vera. Ístaðin skulu aðrar egnaðar trygdarskipanir vera settar í verk. Henda meting skal skrivast í arbeiðsdagbókina ella hjáleggjast hesi.
*Stk. 3.* Fæst besta trygd við at nýta tráðleysa telefonlinju, skal henda verða nýtt.

**§ 21.** Kavarin ella kavaraleiðarin, um ein tílíkur er tilnevndur, skal tryggja sær, at drívskrúva á skipi og øðrum fari, sum verður nýtt í sambandi við kavaraarbeiði ella á kavarastaðnum, ikki gerst virkin meðan kavaraarbeiði fer fram, um ikki so er, at verja er um skrúvuna, og at tað verður skipað soleiðis fyri, at kavarin og lívlína v.m. ikki kunnu vera fyri vanda. Áðrenn drívskrúva verður gjørd virkin, skal kavarin vera kunnaður um tað.

**§ 22.** Tá kavað verður, skulu hjálpitól og útgerð standa á hóskandi tryggum staði og / ella vera væl fest.
*Stk. 2.* Amboð og tól, sum kavarin hevur við sær og nýtir í sambandi við tá kava verður, skulu vera innrættaði, tilevnaði og hava slíka verju, at tey ikki kunnu elva skaða á kavaraútgerðina ella annað tilfar.
*Stk. 3.* Mekanisk amboð og tól skulu vera innrættaði soleiðis, at hesi ikki av sær sjálvum verða virkin og soleiðis, at tey steðga av sær sjálvum, tá kavarin sleppur teimum úr hondum. Um orkukeldan til amboðini og tólini stendur á landi, skal manningin, sum passar orkuveitingina sbr. § 15**,** stk. 4 kunna steðga orkuveitingini á ein lættan hátt.
*Stk. 4.* Tá kavari arbeiðir við amboðum, sum larma, harímillum luftamboðum, hátrýsttólum og líknandi, skal hóskandi oyravernd vera tøk.

**§ 23.** Kavaraarbeiði ætlað til ein ella fleiri kavarar má ikki fara fram, um so er, at viðurskifti nevnd í § 5, stk. 1 ella viðurskifti nevnd í stk. 3 og 4 í hesi grein, gera nýtslu av trýstlættakømrum neyðugt og hesi kømur ikki eru tøk á staðnum, har kava verður.
*Stk. 2.* Er tann í stk. 1 nevnda útgerð tøk á staðnum, kunnu ein ella fleiri kavarar útinna kavaraarbeiði í tann mun, pláss er fyri kavarum í trýstkamari samtíðis.
*Stk. 3.* Er trýstkamar á staðnum kann:
1) kaving sum sambært góðkendum talvum krevur trýstlætting í meira enn 20 minuttir fara fram, ella
2) kann farast longur niður enn 0-30 metrar.

*Stk. 4.* Er trýst- og viðgerðarkamar á staðnum, kann:
1) kaving sum sambært góðkendum talvum krevur trýstlætting í meira enn 60 minuttir fara fram, ella
2) kann farast longur niður enn 40 metrar.

*Stk. 5.* Persónar, sum fáa viðgerð við trýstlætting, skulu vera undir eftirliti, og persónar, sum fáa viðgerð í viðgerðarkamari, skulu hava hjálparfólk hjá sær inni í kamarinum. Tá bert ein persónur er inni í kamarinum, skal einans vanligt lufttrýst vera í kamarinum.

**§ 24.** Á kavarastaðnum skal vera útgerð til fyrstuhjálp og útgerð at fáa persón til lívs aftur, somuleiðis kavingar-, trýstlætta-, og viðgerðartalvur, sum eru góðkendar av Arbeiðseftirlitinum.
*Stk. 2.* Um so er, at umstøðurnar krevja tað, skulu verndarhjálmar til nýtslu á landi og í vatninum, vera tøkir á kavarastaðnum.

*Reinleiki á andingarevninum, samanseting, nøgd, evnislýsing v.m.*

**§ 25.** Andingarevnið skal, við atliti til reinleika,

samanseting, nøgd, evnislýsing v.m. lúka ásetingarnar í kunngerð um kavaraútgerð.

*Stk. 2.* Verður vanlig luft brúkt sum andingarevnið tá kava verður, skal keldan sum veitir andingarevni, hava nóg nógv andingarevni tá byrjað verður at kava, við atliti til tíðina og til dýpi, sum kava verður.

*Stk. 3.* Kelda, sum veitir andingarevnið, sum kavarin ikki hevur uppi á sær, skal uttan mun til, hvussu andingarevnið er samansett meðan kava verður, altíð hava eykanøgd av andingarevni, sum svarar til nýtslu hjá kavara í 5 minuttir á kavaradýpdini uttan so, at kavarin kann fáa tilsvarandi nøgd av andingarevni frá aðrari serstakari keldu. Henda kelda skal vera sett til og vera klár at nýta, tá byrjað verður at kava.

*Stk. 4.* Uttan mun til hvussu andingarevnið er sett saman, skulu kavarar, sum fáa andingarevni veitt gjøgnum slangur frá landi, frá opnum kavaraklokkum ella líknandi, hava hjá sær eyka nøgd av andingarevni ætlað til neyðstøðu, sum svarar til nýtslu í minst 5 minuttir á tí mesta dýpinum, har kavað verður.

*Stk. 5.* Nøgdirnar av eyka andingarevni og andingarevni at nýta í neyðstøðu, sum eru nevndar í stk. 3 og 4, verða ásettar eftir einum brúki uppá 40 litur/minutt á tí viðkomandi dýpinum.

*Skyldur hjá arbeiðsgevara, skipara og reiðara*

**§ 26.** Arbeiðsgevarin skal tryggja, at kavaraarbeiði verður útint í samsvar við ásetingarnar í hesi kunngerð. Tá kava verður frá skipi, liggja somu skyldur hjá skipara og reiðara sbr. §§ 24 og 25 í løgtingslóg um trygd á sjónum.

*Eftirlit, gjald og kæra v.m.*

**§ 27.** Arbeiðseftirlitið hevur eftirlit við, at ásetingarnar í hesi kunngerð verða hildnar og kann krevja, at viðurskifti, sum ikki eru í samsvari við hesar ásetingar, skulu fáast í rættlag beinanvegin, ella innan ta freist sum Arbeiðseftirlitið setir.

*Stk.* 2. Arbeiðseftirlitið tekur gjøld fyri tey í § 27 nevndu eftirlit.

**§ 28.** Avgerðir, sum Arbeiðseftirlitið tekur, kunnu kærast til Vinnukærunevndina innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina.

*Stk. 2.* Kæra er steðgandi, til Vinnukærunevndin hevur tikið averð í málinum.

*Revsiásetingar*

**§ 29.** Um ikki hægri revsing er heimilað sambært aðrari lóggávu, verður brot á reglarnar í §§ 8-27 revsað sambært ásetingunum í løgtingslóg nr. 46 frá 15. mai 2007 um kavaravinnu og kavaraútgerð.

*Gildiskoma*

**§ 30.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi í Føroyum galdandi Bekendtgørelse nr. 30 af 15. januar 1988 om betryggelse ved erhvervsdykkerarbejde og om erhvervsdykkerarbejdes sikre udførelse og kunngerð nr. 138 frá 3. desember 1990 um kavaraútgerð um tryggleika og um læknakanning hjá kavarum.

*Stk. 3.* Í seinasta lagi 12 mánaðir eftir at henda kunngerð er komin í gildi, skal ein skipan vera gjørd viðvíkjandi arbeiðsdagbók, sum er nevnd í § 5, stk. 8.

Vinnumálaráðið, 6. august 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

Nr. 105 6. august 2009

# Kunngerð
# um
# gjøld fyri ymsar uppgávur í sambandi við vinnuliga kaving

Við heimild í § 17, stk.1 í løgtingslóg nr. 46 frá 15. mai 2007 um kavaravinnu og kavaraútgerð, verður ásett:

**§ 1.** Fyri eftirlit og tænastur v.m. sambært ásetingunum í lógini um kavaravinnu og kavaraútgerð tekur Arbeiðseftirlitið gjald sbrt. § 2 og § 3 í hesi kunnngerð.

**§ 2.** Gjøld fyri prógv sum vinnukavari, sbrt. § 23, stk. 4, í kunngerð um kavaraskúlar, kavaraskeið og góðkenda kavaraútbúgving, eru hesi:

1) Útskriva prógv (vanlig)
   Kr. 1.000,00
2) Útskriva prógv (skiftisreglur)
   Kr. 1.000,00.
3) 3) Útskriva prógv (burturblivið)
   Kr. 350,00.
4) Umbýti av útlendskum prógvi
   Kr. 1.000,00.

**§ 3.** Gjald fyri eftirlit sbrt. § 27, stk. 2. í kunngerð um útinnan av kavaraarbeiði á tryggan hátt er:

1) Eftirlit við at ásetingar verða hildnar kr. 2.500,00.

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 6. august 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

FØROYAPRENT

Hefti 21 • Nr. 102-105 • Útgivið tann 13. aug 2009